# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 0652.
# Tíðarskeið: 03/08-16/08 - 2006

**Fólk við frá FRS:** Regin Kristiansen, Rógvi Mouritsen, Arnold Henriksen, Eydna í Homrum (3-9 aug), Bjarni Mikkelsen (9-16 aug) og Lise H. Ofstad.

**Ábyrgd:** Lise H. Ofstad

**Endamál:** Hetta var fyrri túrurin av yvirlitstrolingunum á heysti í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt varð vekt, tal og longdarbýti skrásett fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini vórðu magakanningar gjørdar av toski, hýsu og upsa. Hitin í sjónum varð máldur við miniloggarum.

**Eyka uppgáva:** Prøvar vórðu tiknir av havtasku, og gulllaksaprøvar blivu frystir til nærri kanningar í landi.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinhamns lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Um túrin:** Fóru av Havnini fríggjanáttina 4. august á midnátt. Vit tóku støðirnar á Suðuroyarbankanum, Sandoyarbankanum, Nólsoyarbankanum og eitt sindur norðureftir. Um fimm tíðina 6. aug fór eitt petti av stemplinum inn í turbinuna. Maskinbrekið gjørdi, at skipið sigldi móti landið við næstan ongari ferð. Komu á Havnina kl. 9.30 og landaðu mánadagin 7. aug. Hósdagin tann 10. aug kl 15.35 loystu vit frá Havnini við kós eystur um Svínoynna. Vit tóku allar støðir eystanfyri og komu norður um nær landi. Av tí at trolblokkurin fór, máttu lemmarnir leggjast út gjøgnum flótitrolsblokkin. Týsdagin máttu vit fara vesturum vegna veður. Vit landaðu á Toftum mikudagin 16. aug. Tilsamans vórðu 94 hál tikin, og av teimum vóru 92 góðkend. Veðrið var sera gott næstan allan túrin.

**Prøvataking:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var eftir ætlan fyri øll fiskasløgini tosk, hýsu og upsa.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 29. august. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 1. desember.

**Fyribilsúrslit:** Minni var at fáa av hýsu, toski, svartkjafti, lítla kongafiski, havtasku, brosmu, blálongu og fleiri øðrum fiskasløgum samanborið við samsvarandi túr í fjør (Talva 1). Hinvegin var meira at fáa av upsa, sild, hvítingsbróðri, hvítingi og fleiri øðrum fiskasløgum. Eins og í fjør var glýsufiskur fingin. Hann plagar annars bert at vera á Føroyabanka og har á leið. Sum nakað nýtt fingu vit reyða knurrhana. Annars verður víst til túrfrágreiðingina fyri túr 0656, har úrslit fyri allan landgrunnin eru víst. Vit fingu ein merktan fisk. Hitin við botnin var vanliga millum 6-11 $^{o}$C, men kundi koma niður móti 0 $^{o}$C á djúpum vatni.

**Talva 1**. Veiða, nytrur og magar tikin á túri 0652, samanborið við samsvarandi túrar í 2004 og 2005.

| | Túrur 0652 | | | 2006 (0652) | 2005 (0556) | 2004 (0452) |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Total kg (92 støðir) | Nytrur | Magar | kg/støð | kg/støð | kg/støð |
| UPSI | 34296.85 | 531 | 136 | 372.79 | 230.71 | 449.83 |
| HÝSA | 21375.79 | 571 | 118 | 232.35 | 331.28 | 347.32 |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 4887.88 | | | 53.13 | 43.35 | 37.09 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 4315.38 | | | 46.91 | 60.13 | 44.23 |
| SVARTKJAFTUR | 2627.91 | 80 | | 28.56 | 47.45 | 65.56 |
| TOSKUR | 2316.11 | 533 | 111 | 25.18 | 44.88 | 53.78 |
| HVÍTINGUR | 1866.98 | | | 20.29 | 18.70 | 20.72 |
| GULLAKSUR | 1475.60 | | | 16.04 | 23.72 | 24.75 |
| LONGA | 940.35 | | | 10.22 | 13.06 | 15.07 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 788.64 | | | 8.57 | 16.26 | 16.76 |
| TUNGA | 625.55 | | | 6.80 | 10.89 | 13.90 |
| HAVTASKA | 287.34 | | | 3.12 | 6.12 | 4.00 |
| BROSMA | 263.88 | | | 2.87 | 6.09 | 4.79 |
| SKRAMBUL | 185.99 | | | 2.02 | 7.34 | 2.17 |
| REYÐSPRØKA | 131.97 | | | 1.43 | 2.57 | 3.60 |
| KNURRHANI | 120.01 | | | 1.30 | 1.00 | 0.48 |
| TRANTKONGAFISKUR | 90.04 | | | 0.98 | 1.50 | 3.22 |
| SANDSPRØKA | 82.97 | | | 0.90 | 1.20 | 2.25 |
| SILD | 68.40 | | | 0.74 | 0.52 | 0.04 |
| SILVURMURTUR | 67.15 | | | 0.73 | 0.34 | 0.31 |
| MAKRELUR | 61.31 | | | 0.67 | 0.10 | 0.01 |
| KALVI | 49.99 | | | 0.54 | 0.79 | 1.32 |
| STEINBÍTUR | 47.35 | | | 0.51 | 0.62 | 1.21 |
| BLÁLONGA | 46.22 | | | 0.50 | 5.43 | 3.99 |
| SVARTKALVI | 42.72 | | | 0.46 | 0.59 | 0.99 |
| ROSSAMAKRELUR | 42.33 | | | 0.46 | 0.21 | 2.23 |
| LOLIGO | 34.36 | | | 0.37 | 0.13 | 0.04 |
| HVASSASPREK | 30.39 | | | 0.33 | 1.14 | 0.85 |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 25.37 | | | 0.28 | 0.52 | 1.04 |
| HAVMÚS | 20.01 | | | 0.22 | 0.34 | 1.12 |
| LÁLLA | 18.77 | | | 0.20 | 0.40 | 0.22 |
| TINDASKØTA | 17.14 | | | 0.19 | 0.26 | 2.61 |
| LIRI | 14.90 | | | 0.16 | 0.09 | 0.64 |
| SKØTA | 10.92 | | | 0.12 | 0.19 | 0.11 |
| HALAHVASSA SKØTA | 10.55 | | | 0.11 | | |
| LÝRUR | 9.16 | | | 0.10 | 0.15 | 0.03 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 4.56 | | | 0.05 | 0.00 | 0.00 |
| ROGNKELSI | 4.49 | | | 0.05 | 0.02 | 0.00 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 4.08 | | | 0.04 | 0.10 | 0.41 |
| GLASKVOYSA | 2.45 | | | 0.03 | 0.45 | 0.21 |
| JÁKUPSSKEL | 2.10 | | | 0.02 | | |
| LYCODES ENDIPLEURISTCTUS | 1.64 | | | 0.02 | 0.10 | 0.00 |
| KRØKILSKRUTT | 0.58 | | | 0.01 | 0.01 | 0.01 |
| KLINGRUSKØTA | 0.36 | | | 0.00 | 0.08 | 0.07 |
| REYÐI KNURRHANI | 0.27 | | | 0.00 | | |
| REYÐA HORNABROSMA | 0.24 | | | 0.00 | | |
| GLÝSUFISKUR | 0.23 | | | 0.00 | 0.04 | 0.03 |
| MURRIKRUTT | 0.13 | | | 0.00 | | |
| KRYTTLINGUR | 0.09 | | | 0.00 | | |
| LÍTLI PRIKKAFISKUR | 0.05 | | | 0.00 | 0.00 | 0.00 |
| NEBBASILD | 0.03 | | | 0.00 | 0.00 | 0.00 |
| TILSAMANS | 77317.55 | | | 840.41 | 879.30 | 1128.04 |

**Viðmerkingar:** Ongar.

Lise H. Ofstad